


*Highland Eagle fer við nýggjastu hátøkni at fyrireika leggingina av Farice kaðalinum. Teir fóru avstað í gjárkvøldið, og byrjaðu í Funningsbotni, har teir skula dreggja eina rennu til Íslands.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Hátøkni umborð á Highland Eagle

**Eitt hátøkniligt kaðalskip hevur í hesum døgum ligið við Vestaru Bryggju í Havn. Skipið er farið norðum at fyrireika leggingina av Farice kaðalinum**

FJARSKIFTI

*Rógvi Borðoy*

Skipið hevur ligið í Føroyum og gjørt klárt at fara í gongd við fyrireikingina. Suni Joensen, verkætlanarleiðari hjá Føroya Tele, sigur, at skipið skal millum annað dreggja botnin har sum kaðalin skal leggjast. Hetta fyri at vera heilt vísur í, at alt gongur eftir ætlan.

Seismisku kanningarnar eru longu gjørdar, og alt sær út til at ganga sum ætlað. Men forðingar kunna stinga seg upp, sum seismisku kanningarnar ikki hava avdúkað, og tað er uppgávan hjá Highland Eagle at fáa hesar forðingar burtur.

Tá Higland Eagle er liðugur við fyrireikingarnar, fer eitt annað kaðalskip, Pertinacia, at leggja sjálvan kaðalin , og Highland Eagle skal tá vera hjástaddur sum stuðul, um nakað skuldi stungið seg upp. Um kaðalskipið Pertinacia ikki megnar at grava kaðalin niður í havbotnin, fer Highland Eagle við einum kavbáti og spular kaðalin niður við vatntrýsti. Kavbáturin er ein robottur ella tólmenni, og verður annars kallaður ROV.

## CANTAT ov ótryggur

Orsøkin til, at kaðalin verður lagdur er, at gamli kaðalin er vorðin ov ótryggur, sigur Suni Joensen. Sum nú er, verður fjarskiftistænastan munandi skerd, um trupulleikar stinga seg upp, og tað sigur Suni Joensen ikki vera óvanligt. Um gamli CANTAT kaðalin verður skaddur ella annað, hevur Føroya Tele bert fylgisveinin at líta á, og tað sigur Suni Joensen, at Føroya Tele ikki vil bjóða kundum sínum.

Við tveimum kaðalum gerst sambandið munandi tryggari, og ta fyrstu tíðina koma teir á Føroya Tele eisini at brúka fylgisveinasambandið, so tað verður nærum ógjørligt at slíta sambandið.

Men aðrir eykaágóðar eru eisini, og ein teirra er størri orkuføri. Suni Joensen sigur, at kaðalin fer at gera tað fer at gera møguleikarnar munandi størri fyri at fáa breiðbandsinternet hjá føroysku kundunum. Hann vil ikki siga nakað um hvønn týdning nýggi kaðalin annars fer at fáa fyri føroyska brúkaranum.

Viðvíkjandi einari møguligari príslækking sigur Suni Joensen, at kostnaðurin fyrst má gerast upp, áðrenn tað kann koma upp á tal.

## Felags um ætlanina

Allir føroyskir og allir íslendskir fjarskiftisveitarar eru við í verkætlanini. Íslendska stjórnin spælir eisini ein stóran leiklut, sigur Suni Joensen.

Við hesi verkætlanini verða Føroyar og Ísland samanbundin við restina av umheiminum. Kaðalin verður lagdur frá Seyðirfirði í Íslandi til Funningsbotn, og úr Føroyum til norðasta enda á Skotlandi. Og haðani er skjótt og trygt samband við restina av heiminum, sigur Suni Joensen.

## 400 mió. krónur

Fjarskiftisveitararnir eru vorðnir ásamt um, at kostnaðarbýtið teirra millum skal vera 80 prosent til Ísland, og 20 prosent til Føroyar. Føroysku veitararnir koma sostatt ag gjalda 80 mió krónur, meðan íslendsku veitararnir gjalda 320 mió. krónur. Hetta er roknað út frá væntaða nýtslubýtinum teirra millum.

## Klárt næsta ár

Suni Joensen sigur, at ífylgi sáttmálanum skal kaðalin vera niðurgrivin og klárur at brúka tann 29. november í ár. Men Føroya Tele fer fyrst at gera nakrar royndir við kaðalinum, áðrenn hann verður settur í vanliga nýtslu. Hann sigur, at fyrst í næsta ár skuldi verið liðugt við royndirnar, og kaðalin verður tikin í nýtslu stutt hareftir.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Palli Lamhauge 70 ár




*Palli Lamhauge við bátahylin inni á Fjørð í Vestmanna har ferðaseðlaskrivstovan hjá honum heldur til*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í dag,11. juli, fyllir Joen Pauli, vanliga nevndur Palli, Lamhauge í Vestmanna 70 ár. Palli er føddur og uppvaksin í Vestmanna. Hann er sonur Oluffu, f. Durhuus, ættað úr Garðastovu í Vestmanna og Jákup Andreas Jul Lamhauge, ættaður úr Lamba. Sum ungur arbeiddi Palli eina tíð hjá SEV. Í 1957-58 gekk hann á handilsskúla í Danmark. Í sambandi við at hann saman við øðrum føroyingum var á skeið í London, vitjaðu teir í enska parlamentinum, har fekk hann høvið at síggja ymiskar kendar politikarar sum t.d. Winston Churchill. Palli plagar at skemta við, at ætlanin var, at hann skuldi heilsa upp á Churchill, men hann, Palli, hevði ikki stundir til tess. Heim aftur komin róði hann út í Grønlandi í trý ár. 13. desember 1962 lat hann upp egnan matvøruhandil í Vestmanna, hesin handil hevur nú yvir 40 ár á baki. Í 1981 og 82 arbeiddi hann í Føroyingahavnini í Grønlandi. Síðan 1983 hevur hann havt skipaðan ferðafólkaflutning úr Vestmanna til tey kendu og stórfingnu Vestmannabjørgini. Í hesum arbeiði er hann komin at kenna nógv fólk, bæði kend og minni kend. Palli hevur koyrt í Saab bilum síðan 1967, hann man vera ein tann persónur í Føroyum, sum hevur koyrt longst í Saab. Bilurin ið hann hevur nú er tann fimti í røðini.

Palli er giftur við Hallgerð, f. Heinesen, ættað úr Sandavági, tey eiga børnini: Joan, Herdis, Jákup Andreas, Oddvør, Jens Martin og Fríðgerð.

## Finnur Lómstein 60



Í dag, 11. juli, fyllir Finnur Lómstein í Havn 60 ár. Hann er annars gøtumaður, føddur í Syðrugøtu. Hann er sonur Eriku, sum var næstelst av børnunum hjá Júlionnu og Salomon Greggersen fyri oman Oyruna í Syðrugøtu, og Høgna, sum var næstelstur av børnunum hjá Annu Sofíu og Jóan Fredrik Lervig á Kletti í Norðragøtu.

Erika og Høgni fingu tíggju børn. Finnur er nr. 7 í røðini. Erika doyði ólavsøkudag í 1962. Tá var tað yngsta barnið 13 ár.

Finnur hevur starvast sum skrivstovumaður. Hann fekk skrivstovustarv í Útvarpinum niðri á Bryggjubakka 1. apríl 1963. Tá Útvarpið seinni varð skipað í deildir, gjørdist hann leiðari á fíggjar- og fyrisitingardeildini.

Í 1984 varð tað almenna Sjónvarpið stovnað. Finnur hevði nú verið í Útvarpinum í meira enn 20 ár og hevði hug at skifta arbeiði. Hann fekk starv sum fíggjar- og fyrisitingarleiðari í Sjónvarpinum. Hann er røkin í peningamálum, og gott skil var á fíggjarviðurskiftunum undir hansara leiðslu, bæði í Útvarpi og Sjónvarpi.

Nú eru so liðin næstan 20 ár, síðani hann fór at starvast í Sjónvarpinum. Hann hevði farloyvi í tvey ár, men hevur annars arbeitt har øll árini. Av heilsuávum segði hann leiðarastarvið frá sær í vetur og hevur nú annað starv á stovninum.

Frítíðarítriv hansara hava fyri stóran part verið úti í natúruni. Honum hevur dámt væl at gingið túrar og ferðast kring um í oyggjunum við konu og børnum. Bát hevur hann átt, hevur gjørt nógv av at fara á flot, bæði at fiska og skjóta, og hann setti í mong ár hummarárúsur inni á Tangafirði.

Finnur er gudsóttandi maður og hevur havt fast og virkið tilknýti til Brøðrasamkomuna.

Í 1966 giftist Finnur við Jóruni, dóttir Doru og Dánjal Nielsen í Vatnsoyrum. Jórun og Finnur eiga fýra døtur: Erika er gift við Jákup á Dul Jacobsen og býr í Reykjavík. Anna er gift við Róðin Mellemgaard og býr í Hoyvík. Birgit er gift við Heðini Klett og býr í Paris. Dora býr í Keypmannahavn.

## Martin Frederiksen



3. juli andaðist Martin Frederiksen, Brekkugøta 8, Tórshavn 70 ára gamal. Hann var føddur í Havn 4. apríl 1933. Astrid, f. Egholm, móðurin, 96 ára gomul, býr á Ellisheiminum, V.U. Hammersheimbsgøtu, pápin, Hjalmar, fiskiskipari av Norðtoftum, doyði í 1942. Trý vóru systkinini, Martin, Sonne og systirin Anna, sum hevur búð í Danmark frá barnaárum.

Aftan á realskúlan fór Martin á skrivstovu á Landssjúkrahúsinum. Í 1952 fór hann til Danmarkar, tók prógv á Niels Brocks Handelsskole, var bókhaldari á Tuborg í nøkur ár, seinni settu Olga og Martin, sum búðu í Virum, búgv yviri við Strond í Havn. Børn teirra eru, Maria og Jógvan Martin, búgva í Danmark.

Martin stovnaði flættivirkið, sum helt til úti í Bakka í Havn í 60-unum, men flutti seinni til Runavíkar. "Netavirkið" í Runavík, sum fyritøkan nú nevndist, var rættuliga framkomið virki og virkaði gørn og nótir til føroyska fiskiflotan. Martin hevði eini 15 fólk í starvi, men hann mátti gevast í ringu nítiárunum.

Annars kann vera nevnt at pápin, Hjalmar Frederiksen, doyði á Sanatoriinum í 1942. Hjalmar, sum var ættaður av Norðtoftum, var fiskiskipari og førdi m.a. Verdandi, sluppin sum annars hvarv við mann og mús undir krígnum.

Tað árið Martin varð føddur, varð Hjalmar fisikikongur. 4. apríl 1933 landaðu teir úti í Nólsoy, meðan teir lógu har, fekk Hjalmar boðini um, at hann hevði fingið ein son.

**jl**

## Sólgerð Djurhuus



3. juli andaðist Sólgerð Djurhuus, fyristøðukvinna á Ellisheiminum í Havn, 62 ára gomul.

Sólgerð var borin í heim 4. februar 1941 í Vági, foreldur hennara vóru Andreas og Jóhanna Djurhuus í Vági. Sólgerð var gift Palle Olsen, felagsskrivara í Føroya Arbeiðarafelag, ið er ættaður úr Danmark.

Sólgerð starvaðist á sjúkrahúsum í Danmark, áðrenn hon tók við starvi á psykriatisku deildini á Landssjúkrahúsinum. Hon var sett sum leiðari av Umlættingarheiminum í V. U. Hammersheimbsgøtu í Havn 1. september 1984, og 2.juli 1992 var hon eisini sett sum fyristøðukvinna á Tórshavnar Ellisheimi.

Tað var eftir áheitan frá Sólgerð Djurhuus, at Jákup Lindenskov skrivaði bók um Ellisheimið, sum kom í november 2001.

Tórshavnar Ellisheim varð stovnað 15. august 1935.

## Dagurin

**11. juli. Josva.** Dagurin halgaður minninum um Josva Nuns son, sum var eftirmaður Mósesar og leiddi Ísraels fólk inn í hitt fyrijáttaða landið (Josvabók). Sama navnið sum Jesus, *Gud frelsir.*